# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 26. august 2021 |
| Mál nr.: | 21/07092 |
| Málsviðgjørt: | AP |
| Eftirkannað: | |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum**
(Rokna skrásetingargjaldið á innfluttum brúktum motorakførum við støði í keypsprísinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 26. februar 2010, løgtingslóg nr. 160 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 57 frá 18. mai 2015, løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2015, løgtingslóg nr. 155 frá 12. desember 2018, løgtingslóg nr. 36 frá 9. apríl 2019, løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2020, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 100 frá 25. juni 2020 og løgtingslóg nr. 18 frá 24. februar 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 5 verður orðað soleiðis:
“**§ 5.** Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm$^3$ er virðisavgjaldið 35% av avgjaldsskylduga virðinum, sbr. § 2, stk. 2.
*Stk. 2.* Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm$^3$, ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands, og eru yngri enn 5 ár, er virðisavgjaldið 35 % av avgjaldsskylduga virðinum, sbr. § 2, stk. 2.
*Stk. 3.* Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm$^3$, ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands, og eru 5 ár og eldri, er virðisavgjaldið 65% av avgjaldsskylduga virðinum, sbr. § 2, stk. 2.”

**2.** § 6 verður orðað soleiðis:
“**§ 6.** Fyri motorakfar, sum hevur verið endaliga skrásett uttanlands, verður virðisavgjald rindað av avgjaldsskylduga virðinum, sbrt. § 3, sbr. § 2, stk. 2.”

**3.** Aftaná § 6 verður sett:
“**§ 6 a.** Fyri flytigóðsakfar, sum hevur verið endaliga skrásett uttanlands

styttri enn 10 ár uttanlands verður avgjaldsskylduga virðið niðurskrivað við 10% árliga av upprunaliga virðinum á motorakfarinum, tá tað varð skrásett fyrstu ferð.
*Stk. 2.* Flytigóðsakfar, sum hevur verið endaliga skrásett uttanlands í meiri enn 10 ár, rindar einki skrásetingargjald."

**4.** § 22, stk. 2-5 verður strikað.

**5.** § 32, nr. 4 verður orðað soleiðis:
"4) Ellisakfør, sum eru 25 ár ella eldri frá fyrsta skrásetingardegi at rokna og hava sama skap sum upprunaakfarið."

**6.** Í § 32 verður sum nr. 5 sett:
"5) Sniðbroytt ellisakfør, sum eru 25 ár ella eldri frá fyrsta skrásetingardegi at rokna."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Tørvur er á at gera tillagingar í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum. Tillagingarnar hava til endamáls at lætta um umsitingina innanhýsis á Akstovuni og mótvegis borgarum, sum vilja keypa og innflyta ein brúktan bil ella motorsúkklu úr útlandinum.

Broytingarnar, sum skotnar verða upp at gera, eru:

- At fara frá upprunavirði til útveganarprís, keypsfakturan, í sambandi við útroknan av skrásetingargjaldi fyri innfluttar brúktar bilar og motorsúkklur.

Í fleiri ár hevur tað verið ein stórur trupulleiki hjá Akstovuni at finna fram til upprunavirðið á innfluttum brúktum persón- og vørubilum og motorsúkklum.
Upprunavirðið á innfluttum, brúktum akførum skal brúkast í sambandi við innkrevjing av skrásetingargjøldum. Umsitingarliga er hetta tyngjandi og orkukrevjandi fyri Akstovuna og fer við nógvari tíð, og í nógvum førum er tað ómøguligt at finna fram til upprunavirðið. Tað er eitt dulsmál hjá bilaframleiðaranum, hvat upprunaprísurin á tí ítøkiliga akfarinum er. Tí ber tað ikki til hjá Akstovuni at fáa fatur á hesum upplýsingunum. Hetta vísir seg eisini at vera ein ómøgulig uppgáva hjá innflytarum av akfarinum, sum í útgangsstøðinum hevur ábyrgdina av at finna fram til og víðarigeva hesar upplýsingar til Akstovuna.

Skrásetingargjaldið er eitt virðisavgjald, sbrt. § 2, stk. 1 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum. Afturat virðisavgjaldinum, rinda akfør eisini eitt $CO_2$-avgjald, sum tekur støði í útlátinum frá akfarinum.

Skotið verður upp, at Akstovan kann fara frá at brúka upprunavirðið og yvir til at brúka útveganarprísin, keypsfakturan, í sambandi við innkrevjing av skrásetingargjøldum. Tvs. at Akstovan brúkar keypsprísin til at áseta avgjaldsskylduga virðið og avgjaldsrokna keypsprísin fyri bilar til og við kr. 100.000,- við 50 % og keypsprísin oman fyri kr. 100.000,- við 75 %.

Somuleiðis verður skotið upp, at fyri innfluttar, brúktar motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm3 verður keypsprísurin brúktur til at áseta avgjaldsskylduga virðið, sum, fyri innfluttar, brúktar motorsúkklur, eru yngri enn 5 ár, er virðisavgjaldið 35% av avgjaldsskylduga virðinum, sum er keypsprísurin. Fyri innfluttar, brúktar motorsúkklur, ið eru eldri enn 5 ár, er virðisavgjaldið 65% av avgjaldsskylduga virðinum, sum er keypsprísurin.

Tøl frá Akstovuni vísa, at tað eru sera fá brúkt akfør, sum verða innflutt av brúktbilainnflytarunum, sum eru eldri enn 5 ár. Royndirnar vísa, at veruligi keypsprísurin fyri akførini, svarar á leið til metta upprunavirðið, niðurskrivað sbrt. galdandi § 6 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum.

Omanfyri nevndi útrokningarháttur er tann sami, sum TAKS brúkar til at tollavgreiða akfør eftir og til at áseta, hvussu nógv meirvirðisgjald akfarið skal rinda, svarandi til 25 % av keypsprísinum.

Um Akstovan kundi brúkt keypsprísin, eins og TAKS ger, hevði hetta havt fleiri fyrimunir við sær, bæði fyri umsitingina á Akstovuni og fyri viðskiftafólkini. Innkrevjingin av skrásetingargjøldunum hevði verið munandi lættari at umsitið, og skrásetingargjøld og

skráseting av innfluttum, brúktum akførum kundi verið avgreitt eftir einum degi. Hetta hevði gjørt, at viðskiftafólkini høvdu verið meiri nøgd, vandin fyri mistøkum, sum t.d., at upprunavirðið er skeivt ásett, tí man ikki kennir neyva virðið á bilinum, hevði minkað munandi, tí Akstovan kann brúka ein faktura sum avgjaldsgrundarlag, sum frammanundan er góðkendur av TAKS. Harafturat veit innflytarin frammanundan, hvussu nógv hann skal rindað í meirvirðisgjaldi og skrásetingargjøldum, tá hann kennir keypsprísin, avgjaldsgrundarlagið.

Hagtøl frá Akstovuni vísa, at í 2020 blivu 56 brúktir persónbilar, 24 brúktir vørubilar og 4 brúktar motorsúkklur innflutt til landið.

Í 2018 og 2019 vóru íalt 140 brúktir persónbilar, 19 brúktir vørubilar og 4 motorsúkklur innfluttar til landið.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Eftir galdandi lóggávu verður upprunavirðið brúkt í sambandi við innkrevjing av virðisavgjaldi. Hetta ger arbeiðið hjá Akstovuni tyngjandi og orkukrevjandi, tí tað er sera torført at finna fram til upprunavirðið á akførunum, samstundis sum tað eisini er ringt hjá viðskiftafólkinum at útvega Akstovuni upplýsingar um upprunavirðið.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Tað hevur altíð verið trupult hjá Akstovuni at skaffa upplýsingar fyri upprunavirðinum og ásetingarnar eru fleiri ferðir broyttar. Seinast hetta varð broytt var eftir eitt ítøkiligt mál. Tó hevur tað víst seg, at ásetingarnar eru strammaðar ov nógv, og hetta hevur havt við sær, at tað er sera tungt hjá Akstovuni at umsita hetta, tí bilasølurnar vilja ikki útflýggja upplýsingarnar orsakað av kappingarávum. Tí verður mælt til at broyta virðisásetingina til nakað meira ítøkiligt, sum er útveganarvirðið á bilinum.

Sum nevnt er uppgávan hjá Akstovuni at finna fram til upprunavirðið á brúktum innfluttum persón- og vørubilum og motorsúkklum nærum vónleys, og hetta hevur havt við sær, at tað hevur tikið fleiri dagar at avgreiða mál um skráseting av akførum.

Endamálið við uppskotinum er at gera innkrevjingina av skrásetingargjøldunum lættari at umsita, samstundis sum skrásetingargjøld og skráseting av innfluttum, brúktum akførum kann verða avgreidd eftir einum degi. Somuleiðis verður farið yvir til at brúka sama útrokningargrundarlag, sum TAKS brúkar til at tollavgreiða akfør eftir og til at áseta, hvussu nógv meirvirðisgjald akfarið skal rinda.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Akstovan fer at nýta eitt annað útrokningargrundarlag, tá finnast skal fram til upprunavirðið á innfluttum, brúktum persón- og vørubilum og motorsúkklum. Frameftir verður tað útveganarprísurin, keypsfakturin, sum verður brúktur í samband við innkrevjing av skrásetingargjøldum.

**6.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið er gjørt í samráð við Akstovuna og verður sent til hoyringar hjá niðanfyri nevndu pørtum og í almenna hoyring á hoyringsportali landsstýrisins.

- TAKS
- Vinnuhúsið
- Bilasølum
    - Reyni Service
    - Auto Service
    - Waag
    - Bilasølan
    - Bilkeyp
    - Wenzel
    - Nordcar
    - Nordbil
    - Bergmotors
    - Bilrøkt
    - Carro v/Niels Nattestad
    - Sp/f Bjørg v/Suna Johannesen

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Í 2017 gjørdi Akstovan eina samanbering av 28 tilvildarligum innfluttum, brúktum bilum. Samanberingin vísir, at samlaða virðisavgjaldið verður næstan óbroytt eftir hesum lógaruppskotinum. Hetta sæst eisini aftur í fylgiskjali 2.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur við sær, at tað umsitingarliga verður lættari hjá Akstovuni at umsita økið, og tað verður skjótari hjá Akstovuni at avgreiða málini, tí farið verður yvir til at nýta eitt nýtt útrokningargrundarlag fyri innfluttar, brúktar persónbilar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið fer at gera tað lættari hjá teimum, sum liva av at selja brúktar bilar. Orsøkin til hetta er, at fortreytirnar verða betur kendar hjá teimum. Tað hevur við sær, at tað verður lættari at finna fram til rætta prísin til kundan frammanundan.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Ongir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.9. Markaforðingar

Ongar markaforðingar eru á økinum.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ásetingar um avgjøld.

### 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?

Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum áður eru nevndar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1, § 5**
Stk. 1 er óbroytt í mun til galdandi lóggávu. Tað merkir, at nýggjar motorsúkklur rinda 35% av avgjaldsskylduga virðinum, keypsprísinum.

Í stk. 2 verður skotið upp, at motorsúkklur við motorstødd yvir 50 $cm^3$, ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands og eru yngri enn 5 ár rinda 35% av avgjaldsskylduga virðinum, keypsprísinum, sbr. §  2, stk. 2.

Í stk. 3 er ásett, at motorsúkklur við motorstødd yvir 50 $cm^3$ , ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands og eru 5 ár og eldri rinda 65% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum, keypsprísinum, sbr. § 2, stk. 2.
Endamálið við hesi áseting er at avmarka innflutningin av brúktum motorsúkklum, sum eru 5 ár og eldri við tað, at hesar ikki eru eins væl útgjørdar hvat trygd viðvíkur, eins og nýggjari motorsúkklur eru.

**Til nr. 2, § 6**
Skotið verður upp, at virðisavgjaldið fyri innfluttar, brúktar persónbilar og vørubilar, ið hava verið endaliga skrásettir uttanlands, verður goldið av avgjaldsskylduga virðinum, keypsprísinum. Avgjaldsskylduga virðið á einum innfluttum, brúktum persónbili ella vørubili, sbr. § 2, stk. 2 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, er tollskylduga virðið við innflutningi til landið, CIF virðið, við allari tí útgerð, persónbilurin ella vørubilurin hevur, tá tað stendur í føroyskari havn.
Hetta merkir, at tað er keypsprísurin frá útlendskum seljara, íroknað flutningsútreiðslur, trygging og kostnað, sum er grundarlagið undir útrokningini av virðisavgjaldinum.

Virðisavgjaldið fyri persónbilar verður ásett við støði í § 3 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, har 50 % verður rindað av avgjaldsskylduga virðinum til og við kr. 100.000,-, og 75 % verður rindað í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri kr. 100.000,-

Virðisavgjaldið fyri vøruvognar verður ásett við støði í § 4 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum er 20% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum.

**Til nr. 3, § 6 a**
Talan er um eina avleiðing av, at § 6 verður broytt. Flytigóðsakførini hava ikki nakað *her og nú* keypsvirðið. Tey hava bara eitt upprunaligt keypsvirði, sum verður nýtt at avgjaldsrokna eftir, sbrt. § 3.

Skotið verður upp, at flytigóðsakfør, sum hava verið skrásett uttanlands minni enn 10 ár verður avgjaldsskylduga virðið niðurskrivað við 10% árliga av upprunaliga virðinum. Flytigóðsakfar, sum hevur verið endaliga skrásett uttanlands í meiri enn 10 ár, rindar einki skrásetingargjald.

**Til nr. 4, § 22**
Skotið verður upp, at stk. 2-5 verður strikað. Hetta er ein fylgja av, at ásetingin í § 6 um upprunavirðið verður strikað.

**Til nr. 5, § 32, nr. 4**
Meginreglan er, at fyrsti skrásetingardagur er avgerandi fyri, nær eitt motorakfar verður allýst sum eitt ellisakfar, óansæð um akfarið er skrásett í Føroyum ella uttanlands.

Er fyrsti skrásetingardagur ókendur, verður seinasti dagur í framleiðsluárinum skrivaður í teigin: "skrásett fyrstu ferð" í skrásetingarskjalinum, vísandi til avgerð, sum var tikin av Skatta- og avgjaldskærunevndini tann 06.09.2017 í máli nr. 17/00031.

**Til nr. 6, § 32, nr. 5**
Skotið verður upp, at eitt nýtt nr. verður sett inn sum nr. 5. Somuleiðis verður skotið upp, at sniðbroytt ellisakfør verða undantikin avgjøldum, sbrt. lógini. Eftir galdandi lóg eru ellisakfør fevnd av undantøkuni, og tí verður tað mett neyðugt, at sniðbroytt ellisakfør eisini verða fevnd av undantøkuni.

**Til § 2**

Talan er um áseting um gildiskomu. Ásetingin hevur við sær, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 26. august 2021

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Uppgerð yvir skrásetingargjald fyri tilvildarliga útvaldar bilar, innfluttir í 2017.